Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Landskassastuðul til nýbygging av kirkjum

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at veita landskassastuðul, tá nýggjar kirkjur skulu byggjast í Føroyum?
2. Eru nakrar ítøkiligar umsóknir í Uttanríkis- og mentamálaráðnum um landskassastuðul til nýggjar kirkjur, og um so er, hvussu leingi hava tær verið til viðgerðar í ráðnum?

Viðmerkingar:

Landskassin veitir fólkakirkjuni stuðul til rakstur, men kann eisini eftir § 30 í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar veita upp til 1/3 av góðkenda byggikostnaðinum í stuðli, tá kirkja verður bygd ella umbygd.

Summar kirkjur eru niðurslitnar, og tí verður arbeitt við møguleikanum at byggja nýggjar kirkjur. Fyri at fáa hetta arbeiðið í gongd er neyðugt at fáa svar frá landsstýrismanninum, um 1/3 verður veittur í landskassastuðli ella ei.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 27. oktober 2021

Djóni Nolsøe Joensen